# ARBEIÐSEFTIRLITIÐ

*Administration of Occupational Safety and Health*

Fútalág 1B  P.O.Box 1134  FO-110 Tórshavn  Faroe Islands

Tlf. +298 317811  Fax +298 314489  E-mail: info@arbeidseftirlit.fo


***Skrásetingar nr.:***

**R-F178-1**

# Reglugerð
# um
# inn- og uppskipingararbeiði

Sambært løgtingslóg nr. 58 um arbeiðaravernd frá 24. mai 1974 við seinni broytingum, § 17, stk. 2, hevur Landstýrið heimilað Arbeiðseftirlitinum at fyriseta hesa reglugerð.

## KAPITTUL 1.

### *Økið, ið reglugerðin fevnir yvir.*

**§ 1.** Reglugerðin fevnir yvir alt inn- og uppskipingararbeiði, umskiping, og annars tað arbeiði sum gjørt verður umborð á skipi, sum liggur við kai, bæði hvat føroyskum og útlendskun skipum, v.m., viðvíkur.

Stk. 2. Um arbeiði, við tilknýti til arbeiði eftir stk. 1, skuldi verið umfatað av øðrum lógarreglum, enn teimum reglur sum nevndar eru í hesi reglugerð, verður hetta arbeiði umfatað av viðkomandi reglum.

## KAPITTUL 2.

### *Arbeiðsgevarin.*

**§ 2.** Tað er skylda arbeiðsgevarans, at alt arbeiði verður gjørt eftir galdandi reglum. Í arbeiðinum við inn- og uppskiping, eigur trygdararbeiði at skipast, uttan mun til tal av starvsfólki - sí kunngerð nr. K-A008-1 frá 04.09.1996, kapittul 10.

Stk. 2. Arbeiðsgevarin kann tó geva virkisleiðara ella øðrum álítandi og nóg kønum eftirlitsmanni upp í hendi at røkja hesar skyldur og ábyrgdina av at tær verða hildnar, sí kap. 2 og kap. 3, í arbeiðaraverndarlógini. Hendan avtalan skal tó verða skrivlig.

***Lógarheimild:***

Løgtingslóg nr. 58 um arbeiðaravernd frá 24. mai 1974 við seinni broytingum.
Kunngerð K-E015-1um innrætting av tekniskumhjálpartólum frá 04.09.1995.
Kunngerð nr. K-E015-2 um nýtslu av tekniskum hjálpartólum frá 11.11. 1996.
Umfarsskriv nr. U-G004-3 um samstarv millum Skipaeftirlitið og Landsstýrið frá 29.05.1992.
Umfarsskriv nr. U-G004-4 um samstarv millum Skipaeftirlitið og Arbeiðseftirlitið frá 29.09.1977.
Umfarsskriv nr. U-G004-5 um regulativ fyri lossing og ferming av skipum frá 18.05.1965.


| *Útgivið fyrstu ferð:* | *Seinastu broytingar:* |
| --- | --- |
| **15. desember 1996** | |


## KAPITTUL 3.

### *Arbeiðarin.*

**§ 3.** Arbeiðararnir skulu gera sítt til, at tiltøk, sum eftir lógini ella forskriftir, sum gjørdar eru eftir henni, fyri at verja teir fyri skaðatilburði ella vanlukku, roynast eftir ætlan og skulu teir yvirhøvur ansa sær og halda skil á arbeiðsstaðnum.

Stk. 2. Arbeiðarin skal ansa eftir, at amboð, reiðskapur og maskinútgerð eru í lagi, og hann skal, um so er, at hann ikki sjálvur kann gera nakað við tað, beinavegin siga honum frá, sum situr fyri. Har tað serstakliga er fyrisett í lógini ella í forskriftum, givnar eftir henni, kunnu arbeiðarar, og onnur, eisini koma undir ábyrgd.

## KAPITTUL 4.

### *Arbeiðsumstøður.*

**§ 4.** Alt arbeiði skal á ein hvønn hátt, gerast trygdar- og heilsuliga fult forsvarligt, bæði hvat einstaklingi, og arbeiðinum í síni heild viðvíkur, og skal arbeiði ikki verða darvað av óviðkomandi.

**§ 5.** Øll óviðkomandi ferðsla skal haldast burtur frá arbeiðsøkinum, við tað at arbeiðsøkið verður innigirt við haldgóðari girðing og skeltum, soleiðis at óviðkomandi ferðsla ikki hevur møguleika at koma inn á øki. Slík girðing og merking verður gjørd í samráð við politiið.Viðkomandi ferðsla skal koyra inn á øki, gjøgnum tilætlað lið í girðingini.

**§ 6.** Á arbeiðsøkinum skal verða hóskandi ljós, tilætlað arbeiðnum, soleiðis at alt arbeiði kann fara fram trygdarliga ráðiligt. Ljósið skal ikki blinda ella á annan hátt darva arbeiðinum.

Stk. 2. Gonguteigar og har tað er fyri neyðini at koma til, skulu verða upplýstir. Somuleiðis skulu flutnings- og fersluvegir vera upplýstir, soleiðis at ferðslan og arbeiði annars kann fara trygt farm. Ljósstyrkin skal í minsta lagi verða 25 lux.

**§ 7.** Landgongdir millum skip og land ella millum skip og skip, skulu verða av haldgóðum tilfari og verða útgjørdar við neyðugari tilgerð, sum tryggjar tey sum ganga eftir henni, at tey ikki verða fyri meini. Landgongdir skulu í minsta lagi verða 55 cm breiðar og hava rimaverk ella líknandi til báðar síður.

Stk. 2. Verður bátur nýttur til flutning av fólki til og frá arbeiðsplássi, skal báturin lúka galdandi reglur frá Skipaeftirlitinum.

**§ 8.** Har arbeiðsumstøður á annan hátt, ikki kunnu góðtakast sum ráðiligar, kann Arbeiðseftirlitið áseta nærri krøv hesum viðvíkjandi.

## KAPITTUL 5.

### *Persónlig verndarútgerð.*

**§ 9.** Arbeiðsgevarin hevur skyldu at geva arbeiðaranum tað neyðugu verndarútgerðina, og klæðir, hann hevur fyri neyðini, til at verja seg ímóti vanda, sum kann hótta trygd og heilsu hansara, undir arbeiðinum.

Stk 2. Arbeiðsgevarin skal syrgja fyri at øll kravd verndarútgerð verður nýtt, tá arbeiði byrjar og so leingi arbeiði fer fram.

**§ 10.** Trygdarhjálmur skal nýtast í samband við alt arbeiði sum kemur undir inn og uppskiping, og
skal tað øki sum nevnt er í § 5, setast av til hjálmøki.

Stk. 2. Arbeiðsgevarin skal síggja til at arbeiðsfólkið fær handaðan hóskandi trygdarhjálm, sum ikki er til óneyðugan ampa undir arbeiðinum. Arbeiðsgevarin rindar trygdarhjálmin sum eisini er hansara ogn.

Stk. 3. Undantiknir frá kravinum um nýtslu av trygdarhjálmun eru førarar av trukkum, sleiparum og kranum v. m., har føraraplássið er nóg væl vart við trygdartaki. Undantakið er tó bert galdandi, so leingi førarin situr undir trygdartakinum.

**§ 11.** Trygdarfótbúni við verndartáhettu skal nýtast í samband við alt arbeiði sum kemur undir inn og uppskiping, íkrøking, handfaring av tungum góðsi og arbeiði við trukki og øðrum flutningstólum, har vandi er fyri fótskaða.

Stk. 2. Arbeiðsgevarin ber útreiðslurnar til keyp, viðlíkahald og reingerð av verndarfótbúnanum og hevur ognarrættin til hendan. Møguleiki er tó fyri, at viðkomandi arbeiðsgevarafelag og fakfelagi hjá arbeiðstakaranum, kunnu gera avtalu um býti av útreiðslunum til keyp, viðlíkahald og reingerð av fótbúna v.m. Slík avtala skal verða skriftlig.

**§ 12.** Arbeiði í køldum rúmum, frystirúmum og frystilastum v.m., krevur verndarbúna av slíkum slag, at arbeiðarin verður vardur fyri møguligum heilsuskaða undir arbeiðinum - sí leiðbeining nr. L-E007-1 frá 07.06.1996.

Stk. 2. Arbeiði í frystirúmi má í mesta lagi vara 2 tímar í senn. Har kuldastigið er undir -29 °C, má arbeiðstíðin í mesta lagi verða 30 minuttir í senn, og skal tá skiftast við arbeiði uttanfyri frystirúmið ella við hóskandi arbeiðssteðgi. Arbeiðssteðgur í samband við arbeiði í frystirúmum skal vera minst 20 minuttir, soleiðis at ein kann fáa ta termisku javnvágina (kropshitan) aftur - sí leiðbeining nr. L-E007-1 frá 07.06.1996.

**§ 13.** Har trygdarútgerð verður kravd í samband við arbeiði, skulu neyðug skelti verða sett upp, soleiðis at eingin er í iva um hvør útgerð er kravd.

## KAPITTUL 6.

### *Trukkar.*

**§ 14.** Gaffiltrukkar og gaffilstáplarar, kunnu bert teir persónar koyra, ið hava gildug loyvisbrøv (prógv), tó eru ávís undantøk.

Stk. 2. Tá koyrt verður á egnum øki, har eingin almenn ferðsla kann koma fyri, nýtist trukkurin bert at hava tey ljós, ið eru neyðug til sjálvt arbeiði. Verður koyrt á øki, ið er umfata av ferðslulógini, skal trukkurin verða útgjørdur við forlyktum, baklyktum, bremsuljósi, avvísaraljósum og endurskini.

Stk. 3. Trukkur skal nýtast á forsvarligan hátt og í mun til tað hann er ætlaður, og ikki á nakran hátt ovbyrjast.

Stk. 4. Trukkar, sum nýttir verða til arbeiði eftir § 1, skulu fylgja teimum krøvum, sum nevnd eru í reglugerð nr. R-C002-1 frá 16.01.1997, um gaffiltrukkar.

Stk 5. Reglugerðin nevnd í stk. 4, krevur m.a., at tað í minsta lagi hvønn 12. mánað verður framt eitt eftirlit, av útvegaranum ella øðrum sakkønum.

Stk. 6. Eftirlitið nevnt í stk. 5, skal verða váttað av Arbeiðseftirlitinum, og skal avrit av váttan, kanningarlistum v.m. finnast í eftirlitsbókini fyri viðkomandi trukk.

**§ 15.** Tað er ikki loyvt at nýta gaffiltrukk til persónlyfting. Undantikið er tó persónlyfting í góðkendari arbeiðskurv, til lættari arbeiði og í avmarkaða tíð.

## KAPITTUL 7.

### *Sleiparar v.m.*

**§ 16.** Sleiparar og akfør ella onnur teknisk hjálpiútgerð, ið ikki eru skrásett, og verða nýtt í arbeiðinum, sum kemur undir inn og uppskiping, mugu bert koyrast av fólki sum hevur fingið vegleiðing, og av Arbeiðseftirlitinum verða mett egna til arbeiði, og skal loyvisbræv (prógv) til viðkomandi akfar ella útgerð, verða til taks.

Stk. 2. Sleiparar, akfør, teknisk hjálpiútgerð og viðfestivognar (mafivognar) v.m., sum verða nýttir til arbeiði eftir hesi reglugerð, skulu verða í trygdarligum forsvarligum standi.

Stk. 3. Útgerðin sum nevnd er í stk. 2, og sum nýtt verður til arbeiði eftir § 1, skal fylgja teimum krøvum, sum nevnd eru í kunngerð nr. K-E015-1 frá 04.09.1995, um innrætting av tekniskum hjálpartólum.

Stk 4. Kunngerðin nevnd í stk. 3, krevur m.a., at tað í minsta lagi hvønn 12. mánað verður framt eitt eftirlit, av útvegaranum ella øðrum sakkønum.

Stk. 5. Eftirlitið nevnt í stk. 4, skal verða váttað av Arbeiðseftirlitinum, og skal avrit av váttan, kanningarlistum v.m. finnast í eftirlitsbókini fyri viðkomandi útgerð.

## KAPITTUL 8.

### *Kranar.*

**§ 17.** Øll mekaniskt rikin lyftiútgerð og spøl (kranar), sum verða nýttir til arbeiði eftir § 1, eisini skipskranar, mugu bert ansast av persónum, sum hava tikið kranføraraprógv, ið er góðkent av Arbeiðseftirlitinum.

Stk 2. Øll lyftiútgerð og spøl (kranar), eisini skipskranar, skal við atliti til konstruktión, tilgerð, útgerð, trygdarútgerð og støðufesti verða soleiðis innrættað, at hon kann setast upp, nýtast, viðlíkahaldast og umvælast trygdar- og heilsuliga fult forsvarligt.
Stk 3. Verða brek ella aðrir skeivleikar á kranum staðfestir, skal verða boðað frá til Arbeiðseftir-litið ella Skipaeftirlitið, sum síðani ger av, hvussu farast skal fram.

Stk. 4. Kranar, sum nýttir verða til arbeiði eftir § 1, skulu fylgja teimun krøvum sum nevnd eru í kunngerð nr. K-C003-2, frá 04.09.1995, um lyftiútgerð og spøl (kranar). Undantiknir eru teir kranar, ið hoyra til sjálvt skipið, t.v.s. skipskranar, hesir skulu lúka tey krøv, sum verða sett av

viðkomandi myndugleikum.

Stk 5. Kunngerðin nevnd í stk. 4, krevur m.a., at tað í minsta lagi hvønn 12. mánað verður framt eitt eftirlit, av útvegaranum ella øðrum sakkønum.

Stk. 6. Eftirlitið nevnt í stk. 5, skal verða váttað av Arbeiðseftirlitinum, og skal avrit av váttan, kanningarlistum v.m. finnast í eftirlitsbókini (kranjournalen), í viðkomandi krana.

Stk. 7. Kunngerðin nevnd í stk. 4, krevur m.a. eisini, at kranar, sum verða brúktir uttandura, men ikki eru fast uppsettir á skrásettum akførum, skulu, tá teir eru 10-ára gamlir roknað frá framleiðsluárinum, til eina høvuðskanning, sum bert má gerast av einum virki við serligum sakkunnleika á hesum øki og sum av Arbeiðseftirlitinum er góðkent til hetta arbeiði.

**§ 18.** Tað er ikki loyvt at nýta krana til persónlyfting. Undantikið er tó persónlyfting í góðkendari arbeiðskurv, til lættari arbeiði og í avmarkaða tíð.

**§ 19.** Tað er kranførarin sum hevur ábyrgdina av krananum, og tí arbeiði sum gjørt verður við honum. Íkrøkjari ella lúkumaður hevur skyldu til at geva kranføraranum røtt og vælskiljandi tekin ella boð, tó hevur kranførðarin endaligu ábyrgdina av arbeiðinum.

## KAPITTUL 9.

### *Beriútgerð.*

**§ 20.** Øll beriútgerð, so sum stáltog, stroppar, krókar, ok, og onnur lyftiútgerð skulu, verða haldgott og týðiliga merkt við í minsta lagi hesum upplýsingum: Navn og bústaður hjá framleiðaranum, framleiðsluár, raðnummar og møguligt sniðmerki, størst loyvdu last (SWL ella WLL) og møguligir lastbólkar.

Stk. 2. Er merkingin eftir stk. 1. ikki møgulig, skulu talvur verða til skjals, sum hava neyðugar váttanir, wirecertifikat og upplýsingar eftir stk. 1, og sum skilliga vísa til ávísa útgerð, t.v.s. at útgerðin í minsta lagi skal verða talmerkt.

Stk 3. Verða brek ella aðrir skeivleikar á beri- ella lyftiútgerðini staðfestir, skal verða boðað frá til tann sum situr fyri.

Stk. 4. Beri ella lyftiútgerð sum nýtt verður til arbeiði eftir § 1, skal fylgja teimun krøvum sum nevnd eru í kunngerð nr. K-C003-2 frá 04.09.1995 um lyftiútgerð og spøl (kranar).

Stk. 5. Kunngerðin nevnd í stk. 4, krevur m.a., at tað í minsta lagi hvønn 12. mánað verður framt eitt eftirlit, av útvegaranum ella øðrum sakkønum.
Stk. 6. Eftirlitið nevnt í stk. 5, skal verða váttað av Arbeiðseftirlitinum, og skal avrit av váttan, kanningarlistum v.m. finnsat í eftirlitsbókini fyri viðkomandi útgerð.

## KAPITTUL 10.

### *Plattar v.m.*

**§ 21.** Allir plattar, fiskakassar, smábyngjur, góðsberðarar og onnur útgerð til góðsflutning skulu við atliti til konstruktión og tilgerð, verða soleiðis innrættað, at útgerðin kann nýtast trygdarliga fult forsvarligt.

Stk. 2. Útgerðin nevnd í stk 1, skal viðlíkahaldast og umvælast, soleiðis at hon til eina og hvørja tíð hevur tilætlaðu styrki og innrætting.

Stk. 3. Viðkomandi virki ella stovnur, ið nýtir nevndu útgerð, í samband við flutning, verði tað seg til egið endamál ella til víðari flutning, hevur ábyrgdina av, at útgerðin er í haldgóðum standi, og kann viðkomandi verða drigin til svars, fyri at hava nýtt ella latið víðari óforsvarliga útgerð.

## KAPITTUL 11.

### *Bingjur.*

**§ 22.** Allar bingjur skulu við atliti til konstruktión og tilgerð, verða soleiðis innrættaðar, at tær kunnu nýtast trygdarliga fult forsvarligt.

Stk. 2. Bingjur skulu verða góðkendar eftir reglunum í kunngerð av altjóðasáttmála frá 02. desember 1972 um tryggar byngjur (CBC), **C**onvention for **S**afe **C**ontainers. Sáttmálin er almannakunngjørdur í "Lovtidende C som Bekentgørelse nr. 2 af 17. jannuar 1980".

Stk. 3. Sáttmálin ásetur, at allar byngjur skulu hava eina "CBC trygdargóðkenningarplátu", har upplýsingar um góðkenningarland, góðkenningartilvísing, framleiðarans kenningsnummar, hægst loyvda bruttolast (kilogram og eng.pund), hægst loyvda stáplilast (kilogram og eng.pund) og nýtta royndarlast (kilogram og eng.pund) og skal minst verða 100 mm x 200 mm. Góðkenningar plátan eigur eisini at hava pláss til ástempling av mánaði og ári, tá bingjan seinast varð góðkend.

Stk. 4. Frá framleiðsludegnum og til fyrsta eftirlit kunnu ganga fimm ár. Øll fylgjandi sýn skulu verða framd, fyri í mesta lagi, hvørjar 24 mánaðir.

## KAPITTUL 12.

### *Gildi fyri reglugerðina.*

**§ 23.** Hendan reglugerð kemur í gildi 1. januar 1997.

**Arbeiðseftirlitið**, 15 desember 1996.

Eli Davidsen, stjóri (sign.)